## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men támut veður. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig. Um kvøldið kanska regn.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 4 og 8 stig.

# »Reinir motorar dálka ikki…«

**»Reinar tenn brenna ikki!«, plagdi at standa á tannlæknakoritnum frá skúlabarnatannlæknanum í Havn, hvørs ímynd í nógv ár var Erling Simonsen, tannlækni. Mánadagin kom hann heim til Føroya við umbygda bili sínum, ið nú koyrir upp á rapsolju**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Erling Simonsen er nú sín egni »tankpassari«. Hann innflytir sjálvur rapsoljuna, ið umhvørvisvinarligi bilur hansara nýtir sum brennievni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sjáldan hevur verið gjørt so nógv hóvasták burtur úr einum so lítlum bili, sum VW Lupo bilinum hjá Erlingi Simonsen. Hetta er tó ikki uttan orsøk. Fyrr sungu skúlabørnini »busta tenn, busta tenn, tað sigur Erling Simonsen«. Eitt slagorð hjá tannlæknum er eisini, at »reinar tenn brenna ikki«. Nú kunnu vit eisini siga, at »reinur motorur dálkar ikki«, tað sigur Erling Simonsen.

Hetta er tað, sum er so áhugavert við hesum Lupo bilinum, hann er sera umhvørvisvinarligur. Nú er tað ein fyrimunur hjá Erling Simonsen, at hann hevur havt bilin í hálvtannað ár, áðrenn hann bleiv gjørdur um til rapsbil. Tí merkir hann beinanvegin, um bilurin er broyttur, um hann kraftar tað sama o.s.v.

Erling Simonsen sigur, at so at siga eingin munur er á bilinum, hann trekkjur tað sama, og bilurin er líka kvikur, sum hann var áðrenn umbyggingina.

Tá tangin er tómur, kann hann ikki fáa rapsolju á servicestøðunum í býnum, tí hevur hann ein tunnu við 200 litrum av rapsolju heima. So eina tíð framyvir verður hann sín egni »tankpassari«.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | ÷5 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | 1 |
| Halifax | ÷3 |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 10 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | ÷5 |
| Moskva | ÷3 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | ÷6 |
| Bukarest | ÷1 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 11 |
| Róm | – |
| Malorca | 14 |
| Athen | 6 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | – |
| Jakarta | – |
| Sydney | – |
| New York | 0 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 6 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 990 hPa. vestan fyri Skotland fer móti Íslandi . Eitt annað lágtrýst, 991 hPa. vestan fyri Biscaya fer norðueftir.




Lágtrýstið í útnyrðing úr Skotlandi fer í útnyrðing og brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum vestan fyri Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/02 kl. 06[00]– 25/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,9°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 24/02 kl. 06[00]–25/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 81,1 mm

fk




**Vika 8 – 23. februar**
1. Centrum:
**44 - 48 - 34 - 37 - 04 - 56 - 06 - 65 - 42 - 18**

1. Ramme:
**33 - 71 - 73 - 20 - 24 - 54 - 35 - 46 - 16 - 49 - 64 - 01 - 09 - 31 - 02 - 40 - 08 - 25 - 66 - 26 - 14 - 69 - 60 - 57**

Fuld plade:
**74 - 13 - 41 - 44 - 21 - 39 - 70 - 27 - 67 - 68**

Fri spil: **B_XE_**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **427.255,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **73.689,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **18.444,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **1.045,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **42,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

19. febr.: Mánin næstur jørðini
23. febr.: Seinna kvarter
3. mars: Tendring
7. mars: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 26. feb | 02.51 | 15.19 | 01.51 | 14.19 | 02.06 | 14.34 | 04.51 | 17.19 | 05.51 | 18.19 | 01.06 | 13.34 | 00.06 | 12.34 | 03.06 | 15.34 | 04.06 | 16.34 | 02.36 | 15.04 | 03.51 | 16.19 |
| 27. feb | 03.46 | 16.14 | 02.46 | 15.14 | 03.01 | 15.29 | 05.46 | 18.14 | 06.46 | 19.14 | 02.01 | 14.29 | 01.01 | 13.29 | 04.01 | 16.29 | 05.01 | 17.29 | 03.31 | 15.59 | 04.46 | 17.14 |
| 28. feb | 04.40 | 17.07 | 03.40 | 16.07 | 03.55 | 16.22 | 06.40 | 19.07 | 07.40 | 20.07 | 02.55 | 15.22 | 01.55 | 14.22 | 04.55 | 17.22 | 05.55 | 18.22 | 04.25 | 16.52 | 05.40 | 18.07 |
| 1. mar | 05.30 | 17.54 | 04.30 | 16.54 | 04.45 | 17.09 | 07.30 | 19.54 | 08.30 | 20.54 | 03.45 | 16.09 | 02.45 | 15.09 | 05.45 | 18.09 | 06.45 | 19.09 | 05.15 | 17.39 | 06.30 | 18.54 |

5 707265 100036 >